FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. november 2024
J. nr.: 24/24785-2
Viðgjørt: JS

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-044/2024 frá Grími Sundstein, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálaum, Ruth Vang, um afturrindan av AM-gjaldi, sum er goldið í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd.

Spurningar:

1. Hevur Fíggjarmálaráðið gjørt nakra endurgjaldsætlan fyri AM-gjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd fyri árini áðrenn 2019 ?
2. Verður eitt møguligt endurgjald goldið afturvirkandi til, tá norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd fekk gildi, uttan fyrning og við rentum ?
3. Ætlar landsstýriskvinnan at strika kravið um, at undantak at rinda AMEG bert verður veitt eftir umsókn ?

Svar til spurning 1 og 2:
Heilsumálaráðið fyrireikar lógaruppskot, sum hevur til endamáls at fáa neyðuga heimild til at afturrinda persónum heilsutrygdargjald, sum fyri sama tíðarskeið hava goldið bæði heilsutrygdargjald og eru kravd sosial gjøld í øðrum Norðurlandi.

Avgerð um afturrindan av AM-gjøldum og um, hvussu langt farið verður aftur í tíð, verður ætlandi tikin við støði í sama lesti sum fyri afturrindan av heilsutrygdargjaldi.

Svar til spurning 3:
Neyðugt verður við umsókn frá persónum, sum ynskja undantak frá at rinda AM-gjald. Bæði fyri at vita, um viðkomandi persónar ynskja undantak og fyri at fáa neyðugar upplýsingar at viðgera málið.

Taks upplýsir, at tey hava nógvar umsóknir liggjandi fyri árini áðrenn 2019. Hesar verða viðgjørdar, tá ið niðurstøða er gjørd um afturrindan og um tíðarskeiðið afturrindað verður fyri. Viðkomandi persónar hava fingið kunning um, at teimum nýtist ikki senda nýggja umsókn.

Tinganes, 5. november 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna í fíggjarmálum